# Byggisamtyktir á [www.kortal.fo](www.kortal.fo)

(Dagfest 20-06-2025)

Byggisamtyktir fyri nógvar kommunur síggjast á:

[https://kort.foroyakort.fo/kort/](https://kort.foroyakort.fo/kort/) og [www.kortal.fo](www.kortal.fo)




Vel Laglistan (1) og so Byggisamtyktir (2).




Listin við byggisamtyktum kann víðkast (3) so til ber at síggja einstøku kommunurnar.

Laglistin fyri einstøku kommunurnar kann eisini víðkast (4).

Til ber eisini at tendra/sløkkja fyri ymsu løgunum (5). Í døminum omanfyri síggjast bert øki, sum eru til hoyringar.




Við at peika á eitt øki (6) á kortinum, sæst hvat er galdandi fyri økið. Eru fleiri ásetingar, ber til at blaða ímillum tær (7). Nærri ásetingar síggjast við at velja Leinki til áseting (8). Líknandi frágreiðing kemur so fram:




## 12. gr. Ásetingar fyri øki A: Miðstaðarendamál

1. Øki verður lagt burtur av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur o.t. Í serstøkum førum er loyvt at innrætta íbúð til virkiseigaran ella starvsfólk.

2. Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 0,5.

3. Hús kunnu í mesta lagi verða bygd í 2 hæddum umframt loft og skulu annars ikki vera hægri enn 7 m. til yvirgrindina og 10 m. til mønuna, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahornini). Kjallari verður roknaður uppí sum húsahædd, um so er, at loftið er meira enn

1,0 m. yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallari má vera.

4. Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í 2. og 3. petti, í serstakari byggiætlan fyri hóskiligt, náttúrligt avmarkað øki. Tó kann nettonýtingarstigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 1,0.

5. Hóast ásetingarnar í 3. petti kann kommunustýrið í hvørjum einstøkum føri áseta serlig krøv viðv. útsjónd á verandi bygningum í sambandi við umvæling, umbygging, og tá talan er um nýbygging. Somuleiðis kann kommunustýrið gera frávik frá nýtingarstiginum um so er, at hetta hevur stóran týdning fyri nýtsluna av bygninginum í síni heild.Í hesum føri skal broyting av nýtingarstigi viðgerðast sum undantaksloyvi.